# Ellisheimið í Runavík latið kommununi

**Búsetur Lützen eru lidnir við arbeiðið í ellisheiminum í Runavík. Allir partar eru sera væl nøgdir við úrslitið**



*Tordur Niclasen, fyristøðumaður vísir teimum útsendu frá Sosialinum køkin. Hæddin á vaskinum kann innstillast alt eftir hæddini á persóninum*

*(Mynd Jens Kr. Vang)*

ELLISHEIM

*Heini S. Kristiansen*
*heinik@sosialurin.fo*

Búsetur Lützen hevur havt ábyrgdina av arbeiðinum í ellisheiminum í Runavík. Teir hava bygt uppí gamla ellisheimið, so at tað nú er pláss til 24 fólk afturat. Eisini er rúm gjørt til ergoterapi og til fysioterapi.

Kømrini eru vælútgjørd við øllum hentleikum. Songin kann stillast í øllum møguligum hæddum, og lesiplátan kann stillast og vendast, so at tú fært best møguligu lesistøðu. Breiðband og útvarp er í øllum kømrunum.

– Tað ber væl til at reka eina fyritøku frá einum av rúmunum, sigur Hallur Hansen, samskipari hjá Búsetur Lützen í Eysturoynni.

Tordur Niclasen, sjúkrarøktarfrøðingur sigur, at tey eru sera væl nøgd við arbeiðið. Kømrini er stásilig og nútímans. Ein stór kantina er komin og eitt flott kappel, sum eisini kann nýtast sum samkomuhøli. Tað síðsta av innrættingini manglar enn, men tey eru spent til at taka nýggja partin av ellisheiminum í nýtslu.

Búsetur Lützen hevur gjørt ymisk stórarbeiði í Eysturoynni: Ellisheimið í Norðagøtu, bygningin hjá Leikabúðini og nú ellisheimið í Runavík.

Vit eru høvuðsentreprenørar til arbeiðini, og so keypa vit okkum serfrøði frá øðrum. Ofta fáa vit undirleverandørar at gera prosjekteringina og timburarbeiðið. Vit hava einans lokal fólk til at gera arbeiðið, so tað gevur virksemi í økinum, tá ið vit eru í holt við eina verkætlan.

Í løtuni eru teir í holt við at gera Tofta Skúla. Tað er ein verkætlan, sum strekkir yvir tvey ár og verður mett at kosta 25-30 milliónir.

Teknistovan í Gøtu hevur staðið fyri tekningunum til Ellisheimið.

– Vit eru sera væl nøgd við arbeiðið, sigur Tordur Niclasen, fyristøðumaður á ellisheiminum. Í morgin klokkan 15 verður almenn móttøka, har fólk kunnu koma at síggja tann nýggja partin av ellisheiminum.

– Í morgin verður tað tikið alment í nýtslu, men vit koma helst út í viku 24, áðrenn vit taka fólk inn, sigur Tordur Niclasen.



*Kømurini hava allar hentleikar. Songin skal stillast í ymiskar hæddir, og lesiplátan kann flytast. Møguleiki er fyri at hava breiðband, síggja sjónvarp og hoyra allar tríggjar útvarpsrásirnar*

*(Mynd Jens Kr. Vang)*

# Kuffar gingu úr Selatrað til Havnar

**22 tímar tók tað fimm ungum monnum at ganga teir 101 kilometrarnir úr Selatrað til Havnar. Tiltakið varð gjørt fyri at stuðla Føroya Felag móti Krabbameini**

SKÓTAR

*Heini S. Kristiansen*
*heinik@sosialurin.fo*

Teir fimm røsku mennirnir eru Bogi Sigurstein, Bárður Ellendersen, Trúgva Bech Árting, Karl Jóhan Midjord og Emil Dam. Teir eru allir skótar hjá KFUM & K. Ymiskar fyritøkur og feløg stuðlaðu við einari upphædd og fingu so eina lýsing á jakkarnar, sum teir fimm dreingirnir bóru á túrinum.

Gongutúrurin byrjaði hósdagin klokkan 15, og teir gingu úr selatrað til Kolbeinagjógv og síðani uppum til Strendur. Restina av teiginum gingu teir eftir høvuðsvegnum. Teir ungu mennirnir vóru útlúgvaðir, tá ið tíðindamaðurin hjá Sosialinum hitti teir. Teir hava slitið skógvarnar og eru sera glaðir fyri, at tað er yvirstaðið.

At ganga meira enn 100 kilometrar er mestsum ein tradition hjá skótum. Onkur hevur gingið sama teig, sum teir fimm ungu mennirnir, men tá hevur tað verið úr Havn til Selatrað.

Forkvinnan í foreldrabólkinum hjá Krabbameinsfelagnum tók ímóti kekkinum, sum var áljóðandi 35.000 krónur. – Vit eru sera takksom. Hetta er fyrstu ferð, at onkur setur seg í samband við okkum og bjóðar stuðul. Annars eru tað altíð vit, sum biðja um stuðul. Tað er lívgandi at vita, at onkur hugsar um okkum, sigur Inga Vang, forkvinna í foreldrabólkinum.

Foreldrabólkurin fer á legu við Gjógv í næstum, so pengarnir koma sera væl við.




*Teir fimm skótarnir, sum gingu av Selatrað til Havnar og Inga Vang, forkvinna í foreldrabólkinum hjá krabbameinsfelaginum standa við kekkinum*